

# Fiskur o.a.



JÁKUP REINERT
FISKIFRØÐINGUR

## Stovnsmetingar

Ein týdningarmikil uppgáva hjá Fiskirannsóknarstovuni er at gera metingar av tilfeinginum undir Føroyum og við støði í hesum at veita ráðgeving um skilagóða troytan av hesum tilfeingi. Fyri at hesar stovnsmetingar skulu vera so álítandi sum møguligt, er neyðugt at gera umfatandi kanningar av fiskiskapi, veiðu og lívfrøði hjá fiskastovnunum.

Í hesum sambandi verða landingarnar frá teimum ymsu skipabólkunum regluliga kannaðar av fólki frá Fiskirannsóknarstovuni og hjálparfólki, ið vit hava ymsastaðni í Føroyum. Kanningarnar fevna um longdarmáting av fiskinum fyri at fáa kunnleika um støddarbýtið í veiðuni, at fáa nytrur til vega, so veiðan kann aldursgreinast, og at viga fiskar hvør sær (Talva 1); á henda hátt kann m.a. gerast upp, hvussu vøksturin á fiskinum hevur verið, og hvussu aldursbýtið av fiskinum í veiðuni hevur verið. Aldursbýtið í veiðuni er høvuðsgrundarlagið undir stovnsmetingunum, t.e. metingum av, hvussu stórir stovnarnir eru í vekt og í tali. Í metingarnar innganga eisini hagtøl fyri roynd og veiðu frá tí vinnuliga fiskiskapinum umframt upplýsingar um aldursbýti, veiðu og roynd, ið eru óheftir av vinnuligum áhugamálum.

Hagtøl fyri fiskiskap (roynd) og veiðu eru grundað á avreiðingarseðlar frá hvørji avreiðing og á dagbøkur, ið fiskiførini hava skyldu at føra og senda Veiðueftirlitinum. Tær vinnuliga óheftu kanningarnar verða serliga gjørdar við fiskirannsóknarskipinum Magnusi Heinasyni. Til metingar av botnfiskastovnunum skulu serliga verða nevndar yvirlitstrolingarnar, ið verða gjørdar tvær ferðir um árið, og fevna um allan Landgrunnin niður á um 500 m dýpi (Mynd 1); til uppisjóvarstovnarnar, eitt nú sild og svartkjaft, verða kanningar við ekkóloddi nýttar. Á hesum og øllum øðrum túrum við Magnusi Heinasyni og leigaðum førum verða umfatandi lívfrøðiligar kanningar gjørdar av øllum fiskasløgum, ið fingin verða.

Við støði í vitanini um lívfrøði og ferðingar hjá teimum ymsu fiska- og

***Talva 1.*** *Yvirlit yvir longdarmát, vektir og nytrur frá yvirlitstrolingum og landingum í 2004.*

| | Yvirlitstrolingar 2004 | | | Landingar 2004 | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **Tal mátað** | **Tal vigað** | **Tal nytrað** | **Tal mátað** | **Tal vigað** | **Tal nytrað** |
| Toskur | 8381 | 5694 | 2649 | 56481 | 17261 | 5929 |
| Hýsa | 33536 | 16358 | 2621 | 56992 | 19031 | 5749 |
| Upsi | 16088 | 8762 | 2408 | 44426 | 5141 | 4377 |
| Brosma | 682 | 660 | | 3776 | | |
| Longa | 1195 | 1131 | | 6827 | 1169 | 659 |
| Havtaska | 239 | 238 | | 3711 | 572 | 478 |
| Blálonga | 409 | 297 | | | | |
| Svartkalvi | 5802 | 3670 | | 7102 | | |
| Kongafiskur | 8779 | 7372 | | 3259 | | |




***Mynd 1.*** *Myndirnar vísa trolstøðir hjá Magnusi Heinasyni á yvirlitstrolingunum. Vinstrumegin síggjast tær 100 trolstøðirnar, sum verða tiknar um várið og høgrumegin tær 200 trolstøðirnar, sum verða tiknar um summarið.*

djórasløgunum ber til at skipa stovnarnar í niðanfyrinevndu bólkar. Býtið er ikki heilt eintýðugt, við tað at onkur stovnur kann koyrast í fleiri bólkar.

Serføroyskir stovnar: Stovnar, ið bert eru í føroyskum sjógvi, t.d. toskur á Landgrunninum, toskur á Føroyabanka, hýsa, tunga, reyðsprøka, hvítingur, hvítingsbróðir, føroyskur laksur, fjarðasild, hummari og jákupsskel.

Føroyskir stovnar við avmarkaðari ferðing: Stovnar, ið gýta og vaksa upp í føroyskum sjógvi, men sum seinni ferðast nakað inn og út úr føroyskum øki, t.d. upsi, kalvi og kanska longa, brosma og havtaska.

Felagsstovnar: Stovnar, ið vit hava felags við onnur øki. Hetta eru antin stovnar, ið vanliga halda seg á ymsum havleiðum, men ferðast til eitt ella fleiri felags gýtingarøki at gýta, og sum vanliga hava felags uppvakstrarøki, ella ferðandi stovnar, ið antin ferðast inn í føroyskan sjógv at leita sær føði, ella teir ferðast gjøgnum føroyskt øki á veg til og frá gýtingar- og/ella føðiøkjum. Dømi um tann fyrra av hesum bólkum eru stóri kongafiskur, trantkongafiskur, blálonga, svartkalvi, langasporl, stinglaksur og gulllaksur. Ferðandi stovnar eru svartkjaftur, norðhavssild, laksur og makrelur.

Tað fyrireikandi arbeiðið til stovnsmetingarnar av teimum føroysku stovnunum verður gjørt á Fiskirannsóknarstovuni. Fyri at tryggja, at vísindaliga støðið á hesum arbeiði er nóg gott, er vanliga mannagongdin, at sjálvar stovnsmetingarnar verða gjørdar á sonevndum arbeiðsbólkafundum í Altjóða Havrannsóknarráðnum, á enskum stytt til ICES (International Counsil for Exploration of the Sea). Frágreiðingar frá arbeiðsbólkunum verða latnar tí ráðgevandi nevndini hjá ICES viðvíkjandi fiskiskapi, á enskum stytt til ACFM (Advisory Committee on Fishery Management), og tilmælini frá hesi nevnd er tann endaliga ráðgevingin frá ICES. ICES ráðgevingin er so aftur grundarlagið undir tilmælunum, sum Fiskirannsóknarstovan sambært lógini um vinnuligan fiskiskap á hvørjum ári skal lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.